52-116/2019

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 116/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um persónsupplýsingar í samband við Covid-19 kanningar.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hevur Dátueftirlitið ella annar myndugleiki góðkent, at privatar fyritøkur taka Covid-19 royndir av ferðandi og ferðafólki, ið koma til Føroya og handfara persóns- og heilsuupplýsingar hjá hesum fólkum?
2. Um ikki Dátueftirlitið ella annar myndugleiki hevur góðkent hetta, hvørji atlit hevur tað almenna tikið fyri at tryggja persóns- og heilsuupplýsingar hjá ferðafólki, sum verða kannað?
3. Hvussu er tryggjað, at hesir persóns- og heilsuupplýsingar ikki verða varðveittir hjá privatu fyritøkunum og ikki verða latnir ella seldir øðrum fyritøkum?
4. Um ferðandi, ið hava bústað í Føroyum, nokta at lata seg kanna, hvør er so avleiðingin fyri hesi ferðandi?
5. Hevur landsstýrið spurt Heilsufrøðiligu starvsstovuna um tey hava moguleika at kanna ferðandi, ið koma til landið?
6. Um Heilsufrøðiliga starvsstovan er spurd, hvat er so svarið hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni?

Svar:

Til nr. 1 og 2: Dátueftirlitið hevur 27. juni 2020 givið Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu viðgerðarloyvi til viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum í sambandi við koronakanningar á flogvøllinum í Vágum.

Um mannagongdirnar í sambandi við kanning fyri COVID-19 kann annars upplýsast, at tá ið tað viðvíkur samstarvssáttmálan við Thetis um at gera COVID-19 kanningar í Føroyum av ferðafólki, er tað Heilsuverk Føroya, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, ið stendur fyri kanningunum. Pál Weihe, yvirlækni og leiðari fyri Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, er ábyrgdarhavandi yvirlækni fyri kanningunum. Thetis og tey starvsfólk, ið gera potingar, arbeiða eftir delegatión frá Pál Weihe, jb. § 18 í autorisatiónslógini (anordning nr. 1472/2013) og bekendtgørelse 613/2014 om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp. Pál Weihe skal tryggja, at tey starvsfólk, ið testa tey ferðandi, eru skikkaði til at røkja uppgávuna og hava fingið vegleiðing frá honum í at gera testirnar.

Tá ið tað viðvíkur avtaluna við Smyril Line um at gera kanningar av ferðandi, ið ferðast við Norrønu, er tað m.a. ásett í sáttmálanum, at Smyril Line skal tryggja sær, at kanningarstova, eftir delegatión frá lækna, ger kanningarnar. Tey starvsfólk, ið arbeiða við at gera COVID-19 kanningarnar, arbeiða eftir delegatión frá lækna sambært autorisatiónslógini og "bekendtgørelse om autoriserede sundhedspersoners benyttelse af medhjælp". Smyril Line skal tryggja sær, at tey starvsfólk, ið testa tey ferðandi, eru skikkaði til at røkja uppgávuna og hava fingið vegleiðing frá lækna at gera testirnar.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Til nr. 3: Sáttmálarnar, sum Heilsumálaráðið hevur gjørt í sambandi við kanningarnar, áseta m.a. sum treyt, at kanningarstovurnar einans hava pseudonymiseraðar persónupplýsingar um hendi, og sostatt m.a. ikki kunnu knýta kanningarúrslit beinleiðis til ávíst ferðafólk. Sáttmálarnir hava eisini ásetingar um burturbeining av upplýsingum.

Leggjast kann afturat, at tað er treyt fyri loyvinum frá Dátueftirlitinum frá 27. juni 2020, at upplýsingar um bæði positivar og negativar kanningar verða burturbeindar.

Til nr. 4: Farsóttarnevndin hevur, sambært § 16, stk. 1 í epidemilógini, álagt øllum, sum koma til Foroya í tíðarskeiðinum frá og við 27. juni til og við 10. juli 2020, at lata seg kanna fyri COVID-19 av einum lækna ella einum, sum arbeiðir eftir delegatión frá lækna.

Verða boðini ikki fylgd og ferðandi til Føroya nokta at lata seg kanna, kann viðkomandi, sum noktar, verða førdur fyri ein lækna, eins og viðkomandi – um neyðugt – kann verða tvangsinnlagdur á sjúkrahús til eygleiðing. Tað kann í báðum forum verða við hjálp frá logregluni.

Til nr. 5 og 6: Sjúkrahúsverkið hevur boðað frá, at tey ikki ynskja uppgávuna at kanna frísk ferðafólk, sum koma til landið. Um sjúkrahúsverkið skuldi staðið fyri hesi uppgávuni, hevði tað tikið orku frá øðrum uppgávum í sjúkrahúsverkinum, og tað ynskir leiðslan í sjúkrahúsverkinum ikki.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur higartil bert verið inni í myndini, hvat viðvíkur testing av eini fyriliggjandi roynd, sum er tikin og liggur í einum royndarglasi. Hon hevur sostatt ikki tikið sær av tí partinum, sum fevnir um at skipa fyri og fremja sjálva provatokuna sonevndu podingina.

Í Tinganesi, 3. juli 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður